

*Kári Davidsen, sum her er at finna í týsku framsýningini, sigur, at áhugin fyri týska málinum varð vaktur longu í realskúlanum, har hann hevði eina so óvanliga góða lærarainnu í týskum. Hann sigur eisini, at áhugin fyri týskum er í minking millum næmingarnar, bæði her hjá okkum og í Danmark, har vinnan rópar neyðarróp, tí so fá vilja læra seg týskt.*

*- Hóast týskt er ikki eitt altørvandi mál hjá okkum føroyingum, umboðar landið 4. størsta marknað okkara. Og so er tað eitt týðandi mentanar – og tónleikamál, sigur Kári Davidsen, sum fýlist á, hvussu lítið virt týskt verður í fólkaskúlanum.*

*- Lærugreinin verður als ikki raðfest í skúlunum, og livir heldur ikki upp til ásettu krøvini, sum sett eru. Tí hevur tað avgerandi týdning, hvønn lærara næmingarnir hava havt í fólkaskúlanum. Eitt nú vita vit, sum undirvísa í týskum í miðnámsskúlunum, at næmingar úr skúlanum á Giljanesi, úr Vestmanna og úr Argja Skúla duga framúr væl málið, meðan tað stendur illa til nærum alla aðra staðni í landinum, sigur Kári Davidsen. Hann hevur eisini gjørt eina týskt/føroyska orðabók, sum hann tó ikki sleppur at geva út, tí myndugleikarnir, sum fáast við slíkt, leggja fót fyri hann.*



*Maria Heradóttir og Kristbjørg Høgnesen, sum millum annað undirvísa í enskum. Her í framsýningini úr enskttalandi londum, við biscuittum, fudge, myndum, jam, mustard, dósum og einum dubultdekkara.*



*Bergljót av Skarði og Vónbjørt Tróndheim undirvísa millum annað í føroyskum. Vónbjørt heldur, at næmingarnir eru sera ágrýtnir og tilvitaðir um málið, og dáma væl at kjakast eitt nú um málburð og villur í bløðunum.*

*- At vit hava so lítið liðugt tilfar at taka til, ger, at lærugreinin er bæði avbjóðandi og torfør at undirvísa í. Tað tykist sum, at vit mugu uppfinna djúpa tallerkin av nýggjum á hvørjum ári. Vit skulu alla tíðina fylgja við í tí nýggja, sum kemur út, samstundis sum vit eisini brúka av tí gamla tilfarinum. Men vit lærarar samstarva sera væl um lærugreinina, og teir garvaðu lærararnir eru ikki pírnir við góðum ráðum, sigur Vónbjørt.*



*Úr framsýningini hjá lærugreinini enskt*



*Jette Hoydal í franska horninum, við longum flutes, lekrum ostum, tølandi reyðvíni og vøkrum myndum. Jette er tann lærarin, sum hevur starvast longst á skúlanum, nevniliga líka síðani 1972.*